## Hermenn skulu ikki roykja

Amerikanska verjumálaráðið umhugsar nú at banna amerikonskum hermonnum at roykja, meðan teir gera tænastu. Verjumálaráðið sigur, at roykingin órógvar evnini hjá hermonnunum at hugsa seg um og at meta um støðuna. Tí umhugsar ráðið at banna hermonnum í Afghanistan og Irak at festa sær í, tá teir koma aftur í leguna eftir ta dagligu rannsóknarferðina ella ein samanbrest við fíggindan. Teir skulu heldur ikki hava loyvi til at roykja uttanfyri. Kanningar vísa, at ein triðingur av teimum, sum eru í tænastu hjá amerikanska herinum, roykja.



## Hevur kanska krabbamein

Sambært einari suðurkoreanskari sjónvarpsstøð er leiðarin í Norðurkorea, Kim Jong-il, illa sjúkur av krabbameini. Sjónvarpsstøðin sigur seg hava upplýsingarnar frá kinesiskum og suðurkoreonskum fregnartænastukeldum. Tær vilja vera við, at norðurkoreanski leiðarin hevur í mesta lagi fimm ár eftir. Kim Jong-il er 67 ára gamal, og fjølmiðlarnir hava kjakast um heilsu hansara, síðani hann hevði ein hjartatilburð í fjør. Kjakið hevur samstundis fingið fjølmiðlarnar at gita, hvør skal taka við eftir Kim Jong-il. Tey flestu vænta, at tað verður tann yngsti sonurin, Kim Jong-sun, sum er 26 ára gamal.

# Størsta fiskikappingin á Eiðisvatni

**Ongantíð hava verið so nógv fólk, og ongantíð hevur størsta sílið verið so stórt til árligu fiskikappingina á Eiðisvatni, sum í ár**

FISKIKAPPING

*Eirikur í Jákupsstovu*
*eij@sosialurin.fo*

Millum 400 og 500 luttakarar vóru til árligu fiskikappingina uppi á Eiðisvatni. Hetta er á fimta sinni, at stuðulsfelagið hjá EB/Streymi skipar fyri kappingini, og fyriskipararnir meta, at tað ongantíð hevur gingið so væl sum í ár.

- Vit eru ordiliga væl nøgd. Tað hava ongantíð verið so nógv fólk, og eg haldi, at øll vóru væl nøgd, sigur Guðrun Eidesgaard, sum er ein av fyriskiparunum.

Hon leggur afturat, at uppruddingin hevur gingið øgiliga væl, og at nærum onki sæst eftir kappingina nú. Hinvegin er hon sannførd um, at okkurt kundi verið gjørt betur.

- Eg haldi vit mugu fáa okkum vesir til næsta ár, tí tað hava summi saknað, sigur hon.

Størsta sílið vigaði 765 gramm, og tað er størsta vinnarasílið higartil. Tey bæði næstu sílini vigaðu 750 og 720 gramm.



*Summi vóru rættiliga væl útgjørd til fiskikappingina*



*Magni Laksáfoss, skótaovasti og tingmaður, helt røðu, um hvussu týdningarmikið tað er at hittast í náttúruni*



*Harmonikurnar vórðu funnar fram, eftir at Magni Laksáfoss hevði hildið røðu. Felagssangur var nevniliga á skránni*



*Fólkini við størstu sílunum. Frá høgru: 765 gramm og vinnari, 750 gramm og 720 gramm*



*Vektin varð funnin fram leygarmorgunin, so størstu sílini kundu vigast*